# Fylgja landsliðnum móti Fraklandi

**Føroyingafelagið í Århus skipar fyri bussferð til landsdystin millum Frakland og Føroyar**

FÓTBÓLTSFERÐ
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Hin 3. september bresta Frakland og Føroyar saman á Stade Félix-Bollaert í Lens. Umframt teir ellivu á vøllinum og teira fólk, so verða óivað ein rúgva av føroyingum at finna í Lens, ið er einar tveir tímar frá Paris, skamt frá belgiska markinum.

Vanligt er, at heilt nógv ferðast við fótbóltslandsliðnum á ferð í Evropa. Fleiri minnast óivað dystin móti Týsklandi í Hannover, tá heilt nógvir føroyingar fylgdu við, tá føroyska landsliðið mundi fingið javnleik móti varaheimsmeistarunum.

Frakland telist millum fremstu fótbóltstjóðir í heiminum. Leikarar sum Henry, Trezequet og aðrir verða væntandi at síggja á franska liðnum, sum føroyingar skulu royna at fáa eitt líkinda úrslit ímóti. Líkamikið hvat úrslitið verður, so verður lagið á áhoyrarunum undir øllum umstøðum gott.

## Úr Århus

Tá ferðin hjá føroysku útisetunum verður fyriskipað av føroyingafelagnum í Århus, so byrjar og endar ferðin eisini har. Í næststørsta danska býnum búgva nógvir hundrað føroyingar, og í øllum Jútlandi búgva eitt ótal av føroyingum, umframt at fleiri fólk eisini koma úr Keypmannahavn.

- Farið verður úr Århus tíðliga fríggjamorgunin 2. september, og komið verður til Lens tíðliga sama kvøld. Steðgað verður í Lens í tvær nætur. Ætlanin er at vera saman við 12. manni sjálvan dystardagin, leygardagin, skrivar føroyingafelagið í tíðindaskrivi. Ætlanin er ikki, at talan verður um nakran sunnudagstúr í bussinum.

Tað er sjálvandi eingin treyt, at tú býrt í Århus ella er útiseti fyri at vera við – heldur tvørturímóti, skunda fyrireikararnir sær at leggja afturat.

## Eingin vinningur

Kostnaðurin fyri túrin er 1.150 kr. Íroknað er bussferð aftur og fram og hotel við morgunmati. Hóast føroyingafelagið í næststørsta danska býnum á ongan hátt svimur í pengum, so er

- Vit vinna ikki pengar av túrinum. Tískil ber til at gera hann so bíligan. Tað hevur størstan týdning fyri okkum at savna fólk. Tað er grundarlagið undir okkara felagsskapi, sigur Símun Waag, ið fyriskipar túrin fyri Føroyingafelagið í Århus.

Tað er rættiliga avmarkað pláss, og áhugin hevur longu víst seg at vera stórur.

Fleiri upplýsingar, millum annað um, hvussu tú teknar teg, fáast á www.aarstova.dk.



*Tað verður væntandi ein rættilig innrás av føroyingum í Lens, tá Frakland tekur ímóti Føroyum 3. september*

# Ólavsøkukappríðing 2005

### Trav

| Nr. Ross | Aldur | Litur | Ríðari | Eigari | Heimstaður | Tíð seinast | Tíð nú |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Grani | 24 | Gulur | Andras Davidsen | Sjálvur | Miðvágur | | |
| 2 Dis | 11 | Gul | Marner Joensen | Dánjal Magnussen | Streymnes | | |
| 3 Maskot | 15 | Svartur | Joen Hendrik Davidsen | Andreas P. Davidsen | Miðvágur | 71,2 | |
| 4 Froyur | 15 | Gráur | Anna Magnussen | Sjálv | Lamba | | |
| 5 Drottning | 10 | Reyð | Óli J. Láberg | Knút Lützen | Tórshavn | 61,5 | |
| 6 Savoy | 7 | Gráur | Joan Hansen | Sjálv | Kollafjørður | | |
| 7 Stígandi | 18 | Hvítur | Heri Dahl | Kristian Debes | Tórshavn | 61,8 | |
| 8 Máni | 8 | Svartur | Regin Johannesen | Knút Lützen | Tórshavn | | |

### Tvíspor ung

| Nr. Ross | Aldur | Litur | Ríðari | Eigari | Heimstaður | Tíð seinast | Tíð nú |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9 Leikur | 14 | Gráur | Barbara Røsvik | Sjalv | Tórshavn | 47,8 | |
| 10 Jolly | 24 | Gulur | Andreas P. Davidsen | Brandur Joensen | Miðvágur | | |
| 11 Maskot | 15 | Svartur | Tummas Davidsen | Andreas P. Davidsen | Miðvágur | 37,9 | |
| 12 Hugin | 14 | Gráur | Hildur á Plógv | Gudmund Hansen | Tórshavn | 37,7 | |
| 13 Skenkur | 11 | Svartur | Sólrun Andreasen | Gunnar Grækarisson | Tórshavn | 37,5 | |

### Tvíspor 2. flokkur

| Nr. Ross | Aldur | Litur | Ríðari | Eigari | Heimstaður | Tíð seinast | Tíð nú |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14 Froyur | 15 | Gráur | Anna Magnussen | Sjálv | Lamba | | |
| 15 Krafla | 11 | Gul | Karin Abrahamsen | Tórður Kruse | Eiði | | |
| 16 Skuggi | 15 | Reyður | Bryndis Hjartardóttir | Búi Holm | Bøur | | |
| 17 Brynja | 8 | Gul | Regin Johannesen | Brandur í Dali | Tórshavn | | |
| 18 Mozart | 11 | Flekkutur | Anfinn Reinert | Ian Skylv Hansen | Tórshavn | | |
| 19 Aisa | 12 | Brún | Svenning Reinert | Æna Reinert | Tórshavn | 36,0 | |
| 20 Nora | 14 | Gul | Óli Jóhan Láberg | Andrias C. Lützen | Tórshavn | 35,7 | |

### Tvíspor 1. flokkur

| Nr. Ross | Aldur | Litur | Ríðari | Eigari | Heimstaður | Tíð seinast | Tíð nú |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21 Tirta | 11 | Brún | Marner Joensen | Niels J. Holm | Kollafjørður | | |
| 22 Sina | 7 | Reyð | Sonja í Dali | Brandur í Dali | Tórshavn | | |
| 23 Hekla | 8 | Svørt | Ann Mari Nolsøe | Birgir Hansen | Sørvágur | | |
| 24 Spenna | 7 | Svørt | Jákup Skoradal | Maria og Hergar | Norðoyri | | |
| 25 Fram | 13 | Gráur | Zacharias R. Jakobsben | Júst Rubeksen | Tórshavn | 34,1 | |
| 26 Lokkur | 14 | Brúnur | Gunrid á Plógv | Rólant Reinert | Tórshavn | 35,3 | |
| 27 Kambur | 12 | Gulur | Heri Kristoffersen | Poul Falkvard | Sørvágur | 35,3 | |
| 28 Sólvindur | 11 | Gulur | Hans Pauli Poulsen | Marita Askam | Tórshavn | 34,0 | |

## Nýggju startirnir hava gjørt undurverk.

TÍÐINDASKRIV
*Róðrarsamband Føroya*

Sum flestum kunnugt er tað ein sera stór avbjóðing hjá RSF og stevnufyrireikarum at avgreiða FM-róðrarnar. Hesar fyrireikingar kunnu ikki samanberast við aðra ítrótt uppi á landi. Róðurin hevur nevniliga náttúrukreftirnar sum sín samstarvsfelaga, og ikki er hesin altíð lættur at hava við at gera. Serliga er hetta galdandi, tá streymur og vindur ikki eru róðrinum til vildar. Tí hevur ikki altíð verið líka lætt at fáa bátarnar skjótt og væl frá startinum.

Tey nógvu seinastu árini hevur fastur startur verið nýttur á ymisku stevnunum, men ógvuliga misjavnt er, hvussu hetta hevur eydnast. Eyðsæd var, at tíðin var farin frá gomlu útgerðini, og at nýggj útgerð mátti til fyri at fáa avgreitt róðrarnar betur.

Tá komið var til varmakeldu í Fuglafirði vístu fuglfirðingar stórsemi og gávumildni. P/f Vónin og kappróðrardeildin hjá ÍF við teimum trimum gomlu kappróðrarmonnunum Steingrími á Vollanum, Jón Nolsøe Olsen og Dávi Juul á odda, gjørdu ein nýggjan start av sera góðum tilfari. Royndirnar undir kappróðrinum á Fuglafirði vístu, hvussu einastandandi væl hesin starturin riggaði. Eftir róðurin á Varmakeldu bleiv starturin ognaður RSF. Vit i RSF vilja tí nýta høvi til at takka inniliga fyri hesa stórfingnu gávu.

Tá komið var til Fjarðastevnu, fóru góðar kreftir í gongd við at arbeiða fyri at útvega ein start afturat av sama slag, sum tann, ið bleiv nýttur í Fuglafirði.

Aftur bjóðaði P/f Vónin seg til at gera ein start, sum RSF kundi ogna sær fyri ein bíligan penga. Men hóast hetta góða tilboð var talan kortini um nógvan pening fyri RSF.

Farið var tí til 11 ymiskar fyritøkur kring landið, og vístu hesar vælvild við at stuðla RSF við einum nýggjum starti.

Hesum fyritøkum vil RSF eisini takka hjartaliga. Eisini ein stór tøkk til Dan Petersen av Skála fyri stóru hjálpina.

Sum áður sagt hava nýggju startirnir givið sera góð úrslit. Vónandi vera teir føroyskum kappróðri at gagni í nógv ár framyvir.

Umframt føstu startirnar hevur RSF í ár ognað sær nýggja upptøku-útgerð til dømingina á málinum. Føroya Sparikassi vísti her stóra vælvild við at stuðla keypinum av útgerðini. RSF vil tí eisini senda Føroya Sparikassa eina hjartans tøkk fyri stuðulin.

At enda fara vit í RSF at ynskja øllum eina góða ólavsøku.